gult cyan magenta svart



# Vitan er vald



*Framtíðar fiskivinnan fer í størri mun at brúka teldu enn flakamakinu, segði Ottar Brox, norskur samfelagsfrøðingur, v.m., sum luttók á bygdarfundi á eiði saman við svenska samfelagsfrøðinginum Carl-Gustaf Thornström, h.m.*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Samfelagið hevur ment seg tann vegin, at tann, sum hevur vitan, hevur meira vald enn tann, sum situr á tilfeinginum, heldur norskur samfelagsfrøðingur**

MENNINGARFUNDUR
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Tann, sum er útbúgvin og hevur vitan, er betri fyri enn tann, sum situr á tilfeinginum, sigur norski samfelagsfrøðingurin Ottar Brox.

Á bygdarfundi, sum Granskingardepilin fyri økismenning skipaði fyri á Eiði týskvøldið, segði norski samfelagsfrøðingurin Ottar Brox, at framtíðar vinnan fer at verða rættiliga øðrvísi frá tí, vit higartil hava kent.

Tosað varð, sum vera man, nógv um fiskivinnu, og varð niðurstøða hansara, at fiskivinnan fór at vera fyri stórum broytingum. Hann setti tað soleiðis upp:

Abbin turkaði og saltaði fisk, og tað bar til. Pápin fekk sær flakavirki og fór á heysin. Dóttirin lærdi seg franskt og marknaðarføring. Hon fór at selja fisk á Internetinum og gjørdist rík.

## Teldan er framtíðin

Teldan er týdningarmiklari fyri framtíðar fiskivinnuna, enn flakamaskinan, segði Ottar Brox millum annað á fundinum á Eiði týskvøldið.

Hann vísti á, at tað finnast ymiskir hættir at góðska fisk uppá. Vit tosa mest um tann háttin, sum er at viðgera fiskin frá heilum fiski til lidna vøru. Og tað helt hann ikki altíð vera tann rættasta háttin, um talan skuldi vera um at vinna pening.

Júst her er tað, at kunnleikin til franskt mál og marknaðarføring kemur inn í myndina, segði hann. Tí tað kann í ávísum førum loysa seg væl betri at selja fiskin heilan til Fraklands, heldur enn at arbeiða hann heima á flakavirkinum.

Sjálvandi leggur arbeiðið heima eisini virði eftir seg í arbeiðslønum. Men samanlagt kann vinningurin verða størri, um fiskurin verður seldur feskur og kemur skjótt á marknaðin.

Tað er ein spurningur um at fylgja við tí, sum hendir á heimsmarknaðinum.

## Læri av norðmonnum

Men geri ikki, sum teir hava gjørt, ávarðaði Ottar Brox fundarfólkið. Og við tí vildi hann siga, at norðmenn hava gjørt nógvar feilir í fiskivinnuni, sum føroyingar eiga at ganga uttanum.

Hann segði, at norskur fiskivinnupolitikkur sær út til at fara at útrudda útróðurin. Stutt og greitt.

Norska kvotaskipanin er bygd á umsetiligheit, og tað er nakað lort, fyri at siga tað við reinum orðum. Norskir fiskimenn eru komnir í eina støðu, sum ger, at eingin nýggjur sleppur upp í vinnuna.

Fyri at fáa kvotu, skalt tú hava eitt stórt fiskifar. Men fyri at fá eitt stórt fiskifar, skalt tú hava kvotu. Og har er støðan púra fastlæst, segði Ottar Brox.

Hann vísti á, at tað eru og verða teir kapitalsterku reiðararnir, sum fara at sita á allari fiskivinnuni. Teir keypa allar kvotur og leggja saman til stóru skipini. Smábátarnir detta burtur ímillum.

Ottar Brox metti, at einasti mátin at sleppa undan hesum er at ganga frá handilskvotum til mannskvotur, sum hann nevndi tað. Stutt og greitt, at maðurin fekk sína kvotu heldur enn fiskifarið.

Á fundinum, sum var á Eiði týskvøldið luttók, umframt Ottar Brox, eisini svenski samfelagsfrøðingurin Carl-Gustaf Thornstrøm. Hann var eitt skifti í 1973 á Eiði í samband við lesnað. Á vitjanini hesaferð var uppgáva hansara at gera sammetingar millum Eiði í seksti árunum og nú.

Sosialurin fer at greiða meira frá tí, teir báðir samfelagsfrøðingarnir søgdu, í grein í vikuskiftisblaðnum komandi leygardag.



*Eiðisfólk lurtaðu við áhuga eftir teimum báðum samfelagsfrøðingunum*
*Mynd: Edvard Joensen*

gult cyan magenta svart



# Aftur rok í samgonguni

**Enn einaferð er rok í samgonguni. Tjóðveldisflokkurin finst í opnum brævi at Fólkaflokkinum fyri at hava partapolitiskt valagn og útjaðringarpolitikk í hásæti. Løgmaður er í øðini og krevur at fáa at vita, um Tjóðveldisflokkurin er sinnaður at samstarva um samgonguskjalið ella ei**

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

– Fólkaflokkurin førir flokspolitiskt valstríð.

– Tjóðveldisflokkurin heldur seg bara til fullveldismálið og gloymir allar aðrar avtalur í samgonguskjalinum.

Soleiðis flúgva skuldsetingarnar í løtuni millum teir báðar stóru samgonguflokkarnar, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin.

Tað er enn einferð rok í samgonguni

## Partapolitisk útjarðing

Glóðin, sum hevur ligið og ulmað síðani seinasta stóra samgongustríðið fyri einum mánaði síðani, kyndi aftur bál, eftir at Tjóðveldisflokkurin týsdagin sendi fjølmiðlunum eitt bræv við hørðum atfinningum móti Fólkaflokkinum.

Tjóðveldisflokkurin sigur í brævinum, at tað tykist, sum partapolitiskt valagn og útgjaringarpolitikkur er komin í hásætið hjá summum samgongupolitikarum og landsstýrismonnum.

Í brævinum skrivar Tjóðveldisflokkurin millum annað soleiðis:

»Uttan at orð er grett, ella nakað yvirhøvur er kunnað landsstýri ella samgongu, eru ætlanir kunngjørdar í fjølmiðlunum um privatisering av landsjørðini. Undirsjóvartunlar, sum skulu byrja her og nú, uttan at halda seg til langtíðarætlan landsstýrissins. Milliardaupphæddir í íløgum verða umrøddar uttan fyrilit fyri búskapinum frameftir. Kanningarsetningar verða kunngjørdir, sum hava eitt greitt parapolitiskt spæl og sikti í sær. Og nú verður atkvøtt fyri andstøðuuppskotum um at lækka avgjøld, uttan nakra viðgerð í samgongu.«

## Mugu halda avtalur

»Hetta ber ikki til. Vit hava ávarað ímóti, at farið verður undir flokspolitiskt valstríð í samgonguni á henda hátt – tí tað eru so nógv stór og týdningarmikil økir, har samgongaflokkarnir eru hugsjónarliga ósamdir. Og vit hava støðugt víst á, at tað er fullveldisætlanin, ið er grundarlagið fyri tí varna og ábyrgdarfulla búskaparpolitikki, sum er førdur.«

Tjóðveldisflokkurin endar brævið við at mæla til, at útgjaringin støðgar, og at samgonguflokkarnir halda seg til samgonguavtalur og viðgera møguligar ósemjur innanhýsis í samgonguni, áðrenn nakað verður melað út.

– Okkara ábyrgd er at standa við tað, vit hava lovað. Ikki at lova okkum burtur, sigur Tjóðveldisflokkurin í brævinum til Fólkaflokkin.

## Mugu gevast at grenja

Formaður Fólkafloksins, Óli Breckmann, hevur vegna flokk sín skrivað Tjóðveldisflokkinum eitt aftursvar, sum hann eisini hevur sent fjølmiðlunum.

Óli Breckmann skrivar millum annað soleiðis:

»Gevst nú at grenja. Fólkaflokkurin brýggjar sær ikki um at verða skuldsettur fyri landasvik, bert tí, at vit føra eitthvørt frísinnað politiskt sjónarmið fram. Vit ætla at halda fast um hesa samgongu minst til 30. apríl 2002.«

Í sambandi við, at Tjóðveldisflokkurin í brævi sínum finst at Fólkaflokkinum fyri at hava stuðla uppskotinum hjá Hendriki Old úr Javnaðarflokkinum um at lækka avgjaldið á bensini, sigur Óli Breckmann soleiðis í aftursvari sínum:

»Tað er jánkasligt av Tjóðveldinum at brúka fullveldismálið til at snúgva sær undan samgonguskjali og gjørdari avtalu um lægri bensinavgjald.«

## Hava hildið allar avtalur

Óli Breckmann vísir á, at Fólkaflokkurin higartil einki mál hevur borið í tingið, uttan at tað fyrst er viðgjørt og avtalað í samgonguni. Men Høgni Hoydal trumfaði tvey uppskot inn á ting ímóti boðum løgmans, so samgongan mundi slitnað. Hann vísir eisini á, at Tórbjørn Jacobsen hevur borið trý ikki viðgjørd lógaruppskot í tingið. Eitt um bókasøvn, eitt um fjølmiðlagrunn og eitt um ein hundadýran granskingargrunn og fjøld av granskarum fyri 10 tals milliónur krónur árliga, sum Óli Breckmann málber seg.

Oman á hetta vísir Óli Breckmann á, at Fólkaflokkurin hevur spart pening á fíggjarlógini innan síni málsøki, meðan játtanirnar á málsøkjunum hjá Tjóðveldisflokkinum eru hækkaðar fleiri hundrað milliónir krónur farnu trý árini.

## Samgongan í vanda

Hetta brævaskiftið bendir á, at rættuliga stevið í samgonguni er út av lagi vánaligt. Hóast samgongan varð bjargað fyri einum mánaði síðani, gongst alt annað enn væl í innanhýsis samstarvinum.

Løgmaður er í øðini inn á brævið frá Tjóðveldisflokkinum. Hann sigur við Sosialin, at hann enn ikki hevur tosað við Høgna Hoydal, sum er burturstaddur, um støðuna, men at hann ætlar sær at krevja at fáa at vita, hvat Tjóðveldisflokkurin vil við samgongusamstarvinum.

– Eg ætli mær ikki at ringja til Høgna Hoydal. Eg gangi út frá, at hann einaferð ætlar sær at koma aftur, og tá fari eg at krevja at fáa at vita frá honum, hvat hetta er fyri nakað, og um Tjóðveldisflokkurin ætlar sær at halda seg til samgonguskjalið, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg dugir ikki at siga, um samgongan fer at slitna, ella um hon heldur valskeiðið út.

# Tolið við at vera uppi

**Løgmaður er við at missta tolið við Høgna Hoyda. Hann er í øðini inn á skuldsetingarnar frá Tjóðveldisflokkinum og fer at krevja greið boð um samgongusamstarvið**

SAMGONGUKREPPA
*John Johannessen*

– Eg vil hava at vita frá Høgna Hoydal, um hann ætlar sær at halda samgonguskjalið ella ikki.

Hetta eru greiðu boðini frá einum ógvuliga ørgum løgmanni, eftir at Tjóðveldisflokkurin týsdagin sendi út opið bræv við skuldsetingum móti Fólkaflokkinum.

Løgmaður sigur seg fara at krevja at fáa at vita frá Høgna Hoydal, um hann er sinnaður at halda fram við samgongusamstarvinum við samgonguskjalinum sum grundarlag, ella um hann ætlar at halda fram bert fyri at markera seg í fjølmiðlunum.

– Ætlar Høgni bara at markera seg í fjølmiðlunum, verður ikki neyðugt at fundast á nátt, fyri at bjarga samgonguni, eins og fyri einum mánað síðani, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg ætlar sær ikki at tosa við Høgna Hoydal um støðuna, fyrr enn hann er komin aftur av ferð í Noreg. Tá skal greiða fáast á, um samgongan enn einaferð verður bjargað.

Løgmaður dugir ikki at siga, um samgongan slitnar, ella um hon heldur fram valskeiðið út.

Til páskar selja vit útvald spegl, skáp og møblar fyri

1/2 prís

Komið inn á gólvið og síggið úrvalið!




Thomas Dam búnýti

Niels Finsensgøta 18 - Boks 1094 - FO 110 Tórshavn - Tlf. 314930 - Fax 314933

# Opið hús hjá Javnaðarflokkinum

TÍÐINDASKRIV
**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

Leygardagin 7. apríl verður opið hús í hølunum hjá Javnaðarflokkinum við Áarvegin 14 í Havn frá klokkan 16 til klokkan 19.

Tað er Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, ið skipar fyri, og høvi verður at fáa ein drekkamunn við einum køkubita og kaffi afturvið.

Ætlanin við tiltakinum at at vísa fólki hølini og fáa betri samskifti við limirnar, soleiðis at fólk eisini fáa størri áhuga fyri at koma á limafundir.

Fyrireikararnir vóna at fáa vitjan av tingmanningini og býráðspolitikarum, so limir felagsins fáa høvi at tosa við tey um tað, sum tey hava upp á hjartað.

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag fer eftir páskir at senda út brøv til limirnar, har kunnað verður um, nær limafundir eru og hvør skráin verður.